VIÐMERKINGAR

# Leigu- og eldraíbúðir



Leivur Hansen
*borgarstjóri*

Alsamt størri og størri eftirspurningur er eftir leigu- og eldraíbúðum her í kommununi.

Í hesum sambandi er hugaligt at kunna staðfesta, at á báðum økjum eru ítøkilig stig tikin til tess at skapa møguleikar fyri tílíkum íbúðum.

Eftir sera tungan burð, er kommunan nú umsíðir farin í samstarv við Íbúðargrunnin hjá Húsalánsgrunninum við tí fyri eyga at stovna sjálvsognarstovn, ið skal byggja og reka leiguíbúðir á Berjabrekku.

Talan er um eina ætlan, ið fevnir um 60 íbúðir, sum skal fremjast í trimum byggistigum við 20 í hvørjum.

Miðað verður eftir at bjóða arbeiðið út næsta summar, soleiðis at tær fyrstu íbúðirnar kunnu takast í brúk í 2002.

Á eldraíbúðarøkinum er ein sjálvsognarstovnur, sum Íbúðagrunnurin eigur, í ferð við at umbyggja húsini hjá Zachariasi á Skipafelagnum, undir Pisuvarða, til fimm íbúðir.

Harumframt hava Húsalánsgrunnurin og Íbúðargrunnurin ognað sær onnur lendi í kommununi til fleiri leigu- og lutafelagsíbúðir. Td. eina trøð við Dalavegin og seks raðhúsagrundir úti í Mattalág, sum í fleiri ár hava staðið í hálvum gekki og verið til ampa fyri grannalagið har úti.

Ætlanin er ikki, at grunnarnir sum so skulu eiga og standa fyri byggingini av hesum íbúðum, men at búfelagsskapir við egnum viðtøkum skulu setast á stovn at eiga og reka íbúðirnar.

Hesum tiltøkum hjá Húsalánsgrunninum kunnu vit í býráðnum ikki annað enn heilsa vælkomnum.

Onkur býráðslimur hevur í valgrein havt lyndi til at geva Húsalánsgrunninum ábyrgdina av, at onki enn hevur spurst burturúr ætlaðu eldraíbúðarbyggingini á Skálatrøð.

Hetta er heilt burturvið.

Húsalánsgrunnurin var tvørturímóti til reiðar at fara undir hesa ætlanina saman við kommununi við smávegis broytingum.

Men mongu eykakrøvini, ið komu á borðið undir nevndarviðgerðini av málinum (sum m.a. vóru grundað á parkeringsviðurskiftini), gjørdu, at Húsalánsgrunnurin tá samanum kom ikki helt seg til at luttaka í ætlanini.

Vit býráðslimir eiga tí at taka í egnan barm í hesum máli og ásanna, at ábyrgdin fyrst og fremst liggur hjá okkum sjálvum.

Persónliga havi eg ongar vónir um longur, at komið verður stórt víðari við hesum málinum á hesum sinni.

Hetta er sjálvandi stórt spell fyri tey mongu eldru, ið nú av álvara vóru farin at gleða seg og síggja fram til, at okkurt umsíðir fór at henda við hesari nú eftirhondini 10 ára gomlu ætlan.

Tey noyðast nú ístaðin at líta á, at komandi býráð hevur størri hegni og vilja enn sitandi býráð til at fáa eina endaliga loysn á Skálatraðarprojektinum.

# Eitt sindur um kreativan kommunalpolitikk

Frits Johannesen

Ikki eiti á tilboðum í bløðum frá teimum ymisku kommunalvalevnunum. Tað kemur mær fyri, at hetta er sum eitt gott útsalg á heystardegi. Einki ilt um tað. Rivini eru ræstnað, so skaldskapurin hevur eingi mørk í so máta. Tær steiktu pylsurnar og kókaðu pylsurnar hava rokan uppá av ketchuppi, leyki og sinnoppi – ja, onkur hevur ketchup »í eitt hjørn«, og angin av hesum royki stendur í ikki hvørjum beini, tey skulu standa á.

Ofta er tað so, tá ið útsalgið er av so hoyrist lítið og einki frá øllum tilboðspolitikkarunum. Onkur fall av, og onkur kom inn um grindina. Tá ið tú ert komin inn um, ja, so ert tú har. Nú er tað at politikkurin skal fremjast í verki. Viljin er góður, men tú hoyrir einki, og av og á er okkurt glepsið í bløðunum um okkurt, sum kanska argar eitt sindur. Valevnið, ið tú setti kross fyri gongur kanska tvørs av tíni polittisku hugsan, men ikki verður so nógv hugsað um tað. Tá ið ein tíð er umliðin, minnast fólk kanska ikki hvør kom innum, og hvør ikki kom inn.

Eg sat i sóknarstýrinum í Fuglafirði í átta ár frá 76 til 84 og havi upplivað fyri stuttum, at onkur hevur fílst á, hví eg ikki atkvøddi fyri onkrum málið, sum kom fyri síðst í níti árinum. Hetta er bæði skemtingarsamt og ja, ber kanska boð um, meðan sitið varð í hesum demokratiska forum, at tú kundi gjørt meira vart við teg í skrift og talu, so fólk vitstu hvat tú gjørdi – verið meira kreativur og lætt ljóðið av, so okkurt, sum var meira út yvir tað dagliga, stóð eftir.

Í mongum føri er tað tað sama sum fyrifert. Útstykking, vegagerð, keiðgerð, nýggjan skúla, ítróttarhøll, barnagarð, eldrabýlið.. o.s.fr. Einki ilt um tað. Spurningurin er kanska: Hvør eigur tað størstu oljuhavnina ?????? Her kemur mær fyri, at revagarðarnir spøkja aftur, ella flakavirkini á hvørjum tanga, ella aliringar á hvørjum firði ganga aftur. Hetta kann vera kreativt í sjálvum sær, men hví ikki leggja á ein annan bógv?

Landið setir kommununum setning fyri, at eitt avmarkað krónutal skal verða til íløgur. Tá ið hugsað verður um ferðavinnuna koma ferðafólk ikki at hyggja at oljukeiðum, stórum ítróttarhøllum, pylsuvognum, kassaídnaðarøkjum, o.s.fr., men heldur onkrum, sum hevur tilknýti til okkara mentan. Latin verður prísur fyri reinastu og ruddiligastu bygd í Føroyum. Hetta er gott, men kanska skuldi landið givið kommunum boð um, at gjørt okkurt bæði einsæris og saman við øðrum kommunum, sum hevur størri mentanarligt virði. Hetta kundi eisini verið eitt uppskot sjálvandi fyri kommununum, at lagt lunnarnar soleiðí t. d.: Vit vilja bøta upp á neyst, gróthús, gomul hús í bygdini, varðveita ein ávísan býling, sum hevur siðsøguligan týdning, gjørt øki, hvar øll – listafólk, arkitektar, verkfrøðingar, leikur og lærdur tóku hendur saman og løgdu fleiri demensiónir í, so ikki alt snúði seg um mold, eyr, grús og asfalt, sum í mongum førum bert hevur eina dimensión.

Peningur skal til. Tá ið landið vil hava at kommunur bert skulu brúka eitt ávíst krónutal til íløgur, átti at verið loyst av kjaftbandinum, at so mikið rann úr posanum, at ein demensión kom afturat politikkinum. Í útlondum sært tú nógv projektir, hvar arkitektar og listamenn hava gingið hond í hond og gjørt (lista)verk, sum fólk vitja fyri at síggja hetta megnar verk Ikki nýtist okkum at stíla so høgt, at vit fara um rygg, so kostnaðurin verður ov høgur, nei byrja í smáum.

Eg haldi, vit hava skyldu til hetta. Hetta er so sera einkult. Tosið við listafólkini, arkitektar o. s. fr. um hetta. Hví ikki taka listafólk, pedagogar, sálarfrøðingar, arkitektar og handverkarar upp í, tá ið eitt byggiøki skal gerast byggibúgvið? Mín meting av hesum er ofta, at tað verður farið sera lætt um, tá ið spurningurin um trivna verður við gjørdur. Tað, sum hevur við dagliga lívið at gera, ja, tað nýtist ikki, tí fólk skulu sjálv skapa trivnaðin. Hetta er rætt, men tað verður væl betur avstað farið, um allar demensiónir verða hevdaðar.

Verða ferðafólk var við, at eitt sjaldsamt øki, við listaligum áríni er gjørt t.d. í Lopra, ja, so fara ferðafólk til hetta stað, og bera boð um hetta víða um. Hetta gevur aftur krónur og oyru í okkara kassa.

Fyri fimm árum síðani, tá ið allar milliardirnar vóru farnar fyri bakka, hvussu nógv av hesum krónutali varð latið til listina, listaliga ráðgeving, arkitekturin og tað arkitektoniska? Tað var smávegis. Forbrúkið hevði verið ræðuligt. Tað harmaði mangan, tá ið komið varð út á eggina, at tað bert stóð kanska bara ein pylsuvognur eftir.

Um so er at gerast skal ein pylsuvognur, lat hann so verða mobilan (farpylsuvogn). Hann kundi t. d. í Fuglafirði staðið mánadag Vesturi á Horni, ein týsdag Norðruri á Enni, Toftabønum mikudag, Uppi við Garð og á Bugnum hósdag og fríggjadag í Gjógvará og leygardag á Muntra. Nú eru øll mett í Fuglafirði, so kundi hann farið út á Kambsdal sunnudag at staðið. Soleiðis kundi gongdin verið.

# Bussleiðin



Johan Mortensen
*Valevni fyri Tjóðveldisflokkin*

Bussleiðin hjá Býráðnum skal økja frekvensin til at koyra hvørt 20 minut so at tænastan til nýtaran kann verða enn betur. Bussleiðin er ein kærkomin tænasta sum ikki kostar Býráðnum meira enn slakar 9 mió. og fær Býráðið umleið 30% aftur av kostnaðinum frá ferðaseðlagjaldinum.

Tað eru enn økir sum ikki hava buss samband, td., av Hamarinum á Argjum. Ætlanir eru at gera eina leið hagani kring Havnina sum við einum 20 min., frekvensi fer at bøta munandi um sambandi og nýtsluna av bussunum.

Ætlanir eru at gera ein nýggjan býling í Hoyvíkshaganum. Tað er umráðandi at hetta øki fær bussamband beinanvegin farið verður undir at grava út so at ikki verður sum á Norðastahornið sum ikki fekk bussamband fyrenn ár eftir at økið varð bygt.

Býráðið eigur at stuðla bussleiðini so at privata ferðslan minkar. Fleiri og fleiri og privatir bilar við dieselmotori koyra í Havnini við harav størri og størri dálking. Hetta kan ikki góðtakast útfrá einum »grønum sjónarmiði« og við heilsuni hjá borgarunum í huga.

Tað er átaluvert at Shell og Statoil ikki hava so reina dieselolju á sínum sølustøðum soleiðis at bussarnir kunnu nýta sokallaði umhvørvisfiltur, dieseloljan er snøgt sagt ov skitin! Hvat sigur Heilsufrøðisliga Starvsstovan til hetta mál ? Tjóðveldisflokkurin vil stuðla bussunum.

# ítróttur

Nr. 215 • mikudagur • 8. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

*Eftir at hava veri› skaddur í nærum hálvt anna› ár slapp Per Pedersen aftur at royna seg mánakvøldi›*

# Ein Byrial á vøllinum

**Johan Byrial Hansen var ikki á vøllinum, tá OB vann móti Silkeborg, men fyri fyrstu ferð í 15 mánaðir var svágur hansara at síggja**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Í donsku mi›lunum var› dysturin mánakvøldi› millum OB og Silkeborg mettur sum ein av tí tamara slagnum.

Dysturin var› avgjørdur, tá Ulrik Pedesen mi›skei›is í fyrra hálvleiki sendi bóltin í kassan. Naka› seinni kundi OB økt um lei›sluna, tá Maichale Larsen hjá Silkeborg var› útvístur, samstundis sum OB fekk tilluta› brotsspark. Møguleikin var› tó misn‡ttur, og vi› 10 monnum var› Silkeborg nær vi› at javna, men hvørki dómari ella hjálpardómari varna›ust, at Henrik Tømrer Pedersen hev›i skoti› bóltin inn um strikuna, á›renn OB verjuleikari rudda›i burtur.

**Per aftur á vøllinum**

Ein hending var tó, sum fram um a›rar stjól yvirskriftirnar. Ta› var tá svágurin hjá føroyska landsli›smanninum, Per Byrial Pedersen var› sendur á vøllin í seinna hálvleiki.

Per er giftur Anju Byrial Hansen, sum fyri fáum árum sí›ani var partur av donsku jarn-damunum, sum bergtóku allan hondbóltsheimin. Yrkislei› hennara enda›i, tá hon gjørdi av, at nú átti ma›urin tørn at royna seg.

Per Pedersen stó› tá ovast á danska stjørnuhimmalinum, eftir at hann millum anna› hev›i skora› vi› einum vøkrum saksasparki í landsdysti móti Fraklandi, og enska Blackburn bey› OB 25 mió.kr. fyri leikaran.

**Ska›ar gjørdu um seg**

Fótbóltseydnan var tó ikki vi› honum í Onglandi. Venjarin, sum hev›i keypt hann, var› stutt eftir hetta sagdur úr starvi. N‡ggi venjarin, sum var Roy Hodgson, hev›i danan sum fjór›a val í álopinum, og tí var ta› so sum so vi› spælití›.

Leigumál í Fraklandi og T‡sklandi vór›u heldur ikki eydnan hjá framherjanum, sum at enda flutti aftur til OB. Heldur ikki her tóktist eydnan at vera vi› honum, og eftir hann leingi hev›idrigist vi› ska›a í hælsinuni, noyddist hann at enda at leggjast undir skur›.

Sí›ani eru lidnir 15 mána›ir, har eingin hev›i rokna› vi›, at Per nakran tí› aftur fór at spæla superligubólt aftur, men hesir spádómar eru nú gjørdir til skammar.

Vi› sigrinum vann OB seg upp á sætta plássi› í donsku superliguni. Teir eru seks stig aftan fyri Brøndby á fremsta plássinum.

# Súkkluárið liðugt

*Tey yngstu, eins væl og tey elstu, stríddust sum fyri lívinum um at vinna seg fyrst inn um mállinjuna*

**Seinasta súkklukappingin á árinum varð fyriskipað leygardagin**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*

Hóast luttøkan onkun tí› hevur veri› størri, so mundi hon tó vera á eini lei›, tá endakappingin, Balslev Multikapping 2000, var› fyriskipa› leygardagin.

Kappingin var› tó, eins og tær undanfarnu hjá Tórshavnar Súkklufelag avgreidd í øllum gó›um, og ver›a úrslitini av hesi prenta› ni›anfyri.

Súkklararnir kring landi› fara nú at halda sær eina væl unnta vetrarfrít›, eftir eitt ár, sum hevur sett met vi›víkjandi tali av kappingum.

**Dreingir 9 ár og yngri**

| | |
|---|---|
| 1 Knud Glerup | 8,48 |
| 2 Rani Jacobsen | 8,51 |
| 3 Róaldur Jacobsen | 9,25 |
| 4 Høgni Miné Rasmussen | 9,27 |

**Gentur 10 ár og yngri**

| | |
|---|---|
| 1 Vanja Miné Rasmussen | 10,22 |

**Dreingir 10-14 ár**

| | |
|---|---|
| 1 Beinir Jacobsen | 15,45 |
| 2 Dánjal Michaelsen | 18,12 |
| 3 Jákup Apol | 19,18 |
| 4 Jákup Dahl-Olsen | 19,58 |
| 5 He›in Poulsen | 20,33 |

**Vaksin**

| | |
|---|---|
| 1 Gunnar Dahl-Olsen | 26,18 |
| 2 Sverri Mohr Edvinsson | 27,17 |
| 3 Christian Guttesen | 27,47 |
| 4 Evald Rasmussen | 28,45 |
| 5 Kári Simonsen | 28,50 |
| 6 Kristian Niclasen | 32,43 |
| 7 Robert Vilhelmsen | 36,17 |

## Annar partur byrjar



**Nú øll liðini í bestu mansdeildini hava hitst eina ferð, verður farið undir seinnu helvt av grundspælinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrstu dysturin av hesum ver›ur, tá oddali›i› úr Vestmanna vitjar H71 sunnudagin. Fyrri dysturin millum li›ini bæ›i enda›i vi› tryggum sigri til vestmenningar, og teir eru eisini favorittar undan hesum dystinum.

Tó skulu teir helst ikki rokna vi›, at uppgávan ver›ur eins lætt hesa fer›. Hoyvíkingar hava sí›ani fyrra dystin víst tenn í fleiri uppger›um, og millum anna› man sigurin móti Neistanum hava styrkt um sjálvsálit teirra.

Ein avgerandi spurningur hjá hoyvíkingum er tó helst, um Stefan Dorofte aftur er tøkur. Sunnudagin sat hann uttanfyri vi› ska›a, og hetta merktist serliga væl í álopsparti teirra.